


*Nýggi Seat Ibiza bleiv fyrstu ferð sýndur fram á Bologna Motor Show í desember í fjør*

Seat Ibiza:

# Sportligur spanióli frá VW konsernini

**Ibiza, ið er mest seldi Seat bilurin higartil, kemur nú í eini heilt nýggjari útgávu. 2.7 milliónir bilar eru seldir síðan tann fyrsti Ibiza kom á marknaðin. Við tað at VW konsernin nú eigur sponsku Seat verksmiðjuna, er talan um VW bilar við sjálvstøðugum modellum og búmerkjum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nýggi Seat Ibiza er bygdur yvir sama platform sum t.d. Skoda Fabia. Ibiza hevur sjálvstøðugt design og tann framkomna undirvognsskipanin gevur bilinum sportligar koyrieginleikar, Sama er galdandi innan, har setrini og instrumentborðið eisini er í sportligum stíli.

### Elektrohydrauliska servostýring

Elektrohydrauliska servostýringin gevur bilinum eina sera stútta og beinleiðis stýring. Lasersveisingarnar av heilgalvaniseraða karossaríinum gera sítt til at bilurin virkar sera stabilur at koyra og samlikvaliteturin er í topp. Eisini innan teknisku menningina er nýggi Ibiza ein sera framkomin bilur.

### Stella, Sport og Signo

Tríggir dieselmotorar eru at velja ímillum, har tann størsti er ein 1,9 litur TDI við 130 hk, ið er tann størsti dielselmotorurin í hesum klassanum. Í hesi útgávuni hevur bilurin 6 gear. Størsti bensinmotorurin er ein 1,4 litur 16V við 100 hk. Ibiza verður gjørdur í útgávum við 3 og 5 hurðum og í hesum trimum útgávunum hvat útgerð viðvíkur: Stella, Sport og Signo. Bilurin kemur til Danmarkar í mai mánaða, so tað verður ikki leingi til hann kann síggjast og roynast á bilasøluni hjá Øssur Johannesen.



*Ibiza innan: Setrini og instrumentborðið eru í sportligum stíli*

SEAT

Søluumboð:

Bilasølan v. Øssur Johannesen

Vegurin Langi
FO-110 Tórshavn
Tel.315354
www.audi-vw.net




*Lars Egemose, sølumaður á Bilasøluni Øssur Johannesen væntar bilin í vár*




**Suzuki Swift**



1,0 GLS 3-h
1,0 GLX 5-h
1,3 GLS 3-h
**prísur frá kr. 111.900,-**

**Suzuki Wagon R+**



1,3 GL
1,3 GL Aut.
Sport - Wagon R 1,3
**prísur frá kr. 129.000,-**

**Suzuki Ignis**



1,3 GL 3-h
1,3 GL 5-h
1,3 GL 5-h Aut.
1,3 GL 5-h 4WD
**prísur frá kr. 131.000,-**

**Suzuki Baleno**



1,3 GL Sedan
1,3 GL Stationcar
1,6 GLX Stationcar
**prísur frá kr. 138.000,-**

**Suzuki Liana**



1,3 5-h
1,6 5-h
1,6 5-h Aut.
**prísur frá kr. 149.000,-**

**Suzuki Grand Vitara**



1,6 3-h
2,5 V6 5-h
2,0 TD 5-h
2,0 TD 5-h Aut.
**prísur frá kr. 188.000,-**

## Suzuki Liana - nú eisini sum sedan




**Í fjør kom Suzuki Liana á marknaðin sum ein rúmligur familjubilur við 5 hurðum. Nú er Liana eisini komin sum sedan við 4 hurðum. Bilurin er væl útgjørdur við nógari trygdarútgerð.**

Suzuki Liana sedan er ein rúmligur familjubilur við góðum plássi til tey ferðandi og viðføri teirra. Viðførisrúmið er 447 litrar, ið má sigast at vera eitt tað størsta í hesum klassanum. Undirvognurin er bygdur upp við óbundnari McPhersen fjaðraskipan, ið gevur bilinum sera góðar koyrieginleikar. Instrumentborðið er ikki heilt vanligt, vísarnir eru digitalir og lættir at avlesa. Bilurin er væl útgjørdur við nógvar trygdarútgerð so sum ABS bremsuskipan, airbag báðumegin framman og í síðunum, start og tjóvarísikring, el-síðurútar í øllum fýra hurðunum, sentrallás, el-síðuspegl, varma í framstrunum og førarasetrið kann stillast í hædd.

## Størsti Suzuki nakrantíð - Grand Vitara XL_7



**Suzuki eru komnir á markna in við Grand Vitara XL_7, i  er stórur og rúmligur persónbilur. XL_7 er størsti Suzuki sum nakrantíð er gjørdur.**

Grand Vitara er ein stórur og rúmligur 7 persónabilur, ið einanst fæst við 2,7 litur V6 motori og 173 HK. Ramman sum bilurin er settur omaná, er soleiðis gjørd, at ongar ristingar og vibratiónir merkjast á óslættum undirlendi. V6 motorurin ger sítt til at bilurin virkar lættur at umgangast. Talan er um ein luksusbil, har næstan alt er standard, sum til dømis ABS bremsuskipan við EBD, aircondition, elektriskt stýrda ventilatiónsskipan, fart pilot, el-drivnar síðurútar, el-drivin síðuspegl og sentrallás við fjarstýring. XL_7 fæst eisini við automatiskum gearum og kann leverast sum vørubilur.

SUZUKI

**Spf. Eyðbjørn Hansen**

Bilasøla og verkstaður
Varðagøta 75 · FO-100 Tórshavn
Telefon: 313375 · Faks: 311495

www.suzuki.fo